## FSF-handil á netinum

Fótbóltssamband Føroya hevur nú latið upp ein handil á alnetinum. Í fyrstu atløgu ber til at keypa landsliðstroyggjur og bøkur, sum FSF hevur givið út. Talan er um landsliðstroyggjurnar frá Puma, sum nú verða seldar. Størstu støddirnar eru longu útseldar, so støddirnar, ið nú verða lýstar til sølu eru frá stødd medium og niðureftir. Harumframt er eisini møguligt at keypa tvær bøkur. Talan er um Fótbóltur Framá, sum Jógvan Martin Olsen og Johann Nielsen hava skrivað, og Fótbóltslógirnar, sum fyri fyrstu ferð er komin í føroyskari týðing.



## Ítróttargalla í Runavík

Leygarkvøldið verður Ítróttargalla í høllini í Runavík. Hetta er fjórðu ferð at henda vælumtókta veitsla, sum Kappróðurin Nsí, Støkk, Tjaldri og Nsí skipa fyri, verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík. Aftur í ár verður nógv spennandi undirhald á skránni, m.a. dansishow, sangur, gestarøðari og avdúkan av ársins ítróttarfólkum. Vælumtókti bólkurin við Flemming Petersen spælir til dans eftir borðhaldið og Magni Poulsen frásøgumaður. Veitslan er fyri øll, ikki bert fyri ítróttarfólk, men eisini áhugaði, áskoðarar, viðhaldsfólk og stuðlar. Aldursmarkið er 8. flokkur.

B36-HB:

# Grannarnir eru væl fyri



*Dysturin í Gundadali millum B36 og HB byrjar klokkan 18. Á sandi verður byrjað klokkan 17.45*

**Fyrstu Formula-umførini hava givið positivar ábendingar hjá bæði B36 og HB. Í kvøld skulu grannarnir dystast í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Formula-deildin bert er tvey umfør gomul, so hava B36 og – serliga – HB prógvað, at tey aftur í ár skulu roknast millum topkandidatarnar.

Í HB hava tey kanska roynt at geara vónirnar nakað niður við útsagnum um, at liðið enn ikki hevur havt nakra veruliga styrkisroynd, og í so máta er talan í kvøld um tí fyrstu av slagnum.

Og í øllum førum skal hópurin prógva, at teir eru nóg breiðir til at bera nakað av fráveru. Hjá oddaliðnum eru hvørki Rógvi Poulsen ella Páll Mohr Joensen tøkir, tí teir eru skaddir. Ólavur S. í Ólavsstovu hevur eisini drigist við skaða, men hann var á beinkinum seinast, og so er spurningurin, um hann fær nakran leiklut í dystinum.

### Bíða eftir áleyparanum

Hjá B36 er Ingi Højsted enn ikki tøkur, eftir at hann varð skaddur í fjórðingsfinaluni móti 07 Vestur. Og ivamál er eisini um Odmar Færø, sum noyddist av vøllinum við einum skaða, tá B36 um vikuskiftið spældi móti NSÍ.

B36 hevur í nakrar vikur bíðað eftir, at arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá nýggja nigerianska áleyparanum, Patrick Sunday Okoro, kemur í rættlag. Tá vit frættu úr B36 í morgun var hetta enn ikki komið í rættlag, og tí er líkt til, at tað ikki verður fyrr enn um vikuskiftið, at nýggi spælarin kann spæla fyrsta dystin fyri B36.

B71-EB/Streymur:

# Triðja hálvfinalan á rað

**Triðja árið á rað er EB/Streymur í hálvfinaluni. Og móti B71 mugu teir átaka sær favoritt-leiklutin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur vitjaði tvær ferðir á Sandi í fjør, og báðu ferðirnar fingu teir fulla úrtøku.

Nú talan er um tvær hálvfinalur, kann minni eisini gera tað, men tað er einki at ivast í, at gestirnir mugu roknast sum favorittar undan dystinum í dag.

### Tveir resta á Sandi

EB/Streymur hevur eisini fyrimun, tá um ræður manningarspurningin til dystin. Bárður Olsen var leikbannaður seinast, men hann er nú aftur tøkur hjá Sigfríði Clementsen, og í aðrar mátar er hópurin ikki skerdur.

Hjá B71 noyðist venjarin, Eli Hentze, at vera tveir spælarar fyriuttan. Símin Hansen fekk reytt kort í Gundadali móti HB, og tað leikbannið má hann sita av sær í kvøld.

Anders Nielsen fór tá eisini av vøllinum við skaða, og tað er lítið, sum bendir á, at hann longu nú er tøkur aftur.

## EM-lutakast fríggjadagin

**Hondbóltssambandið hevur tilmeldað føroyska manslandsliðið til EM-undankappingina. Fríggjadagin fæst at vita, hvørji tey fimm mótstøðuliðini verða**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialuirn.fo*

Fríggjakvøldið 18. apríl verður lutakast í EHF, hvussu Føroyar skulu spæla í undankappingini til EM 2010, ið verður í Eysturríki.

Føroyar koma í ein bólk við seks londum, og tað er greitt, at Russland, Pólland ella Ísland eisini verða í okkara bólki.

Styrkismett sum tvey'arar eru: Slovenia, Noreg, Ungarn, Svøríki, Serbia, Kekkia og Ungarn, og seedað sum trý'arar eru: Slovakia, Sveis, Portugal, Hvítarusland, Rumenia, Litava og Makedonia.

Dystirnir í undankappingini skulu spælast á heysti 2008 og á vári 2009.

Liðini skulu spæla ein útidysti og ein heimadyst. Vøllurin, sum spælast skal á, skal bert hava strikur til hondbólt og kann bert hava eitt ávíst tal av lýsingum á.

## Stóra royndin hjá Laudrup

**Liðfelagarnir frá Dream Team hjá Barcelona, Ronald Koeman og Michael Laudrup, leiða í kvøld hvør sítt lið á vøllin til sponsku steypafinaluna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum gongdin hevur verið hetta kappingarárið, er eingin ivi um, at tað er Michael Laudrup, sum hevur vunnið sær betra umdømið sum venjari í Spania.

Hóast kappingarárið við Getafe byrjaði illa, so hevur liðið ment seg heilt nógv. Teir vóru bara sekund frá at senda Bayern München úr UEFA-cup kappingini, og í sponsku steypakappingini hevur Getafe altso vunnið seg fram til steypafinaluna. Eina finalu, sum kann geva lítla Madrid-felagnum fyrsta steypið av týdningi yvirhøvur.

Hjá Koeman hevur umrøðan als ikki verið tann mest positiva. Hann kom til Valencia í heyst, men tað hevur ikki eydnast fyrrverandi kanónskjúttanum at lyfta Valencia nevnivert. Spælara fyri spælara er talan annars um eitt lið, sum átti at staðið seg í spanska oddinum, og tí er verandi støðan sum nummar 15 í sponsku liguni alt annað enn nøktandi. Og tað økir eisin um trýstið á venjaran, sum kanska – men bara kanska – kann bjarga sær sessin við einum steypasigri.

## Kappingin um Løgmanssteypið

**Hálvfinalurnar**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 16.04 | B71-EB/S | Eiler Rasmussen |
| 16.04 | B36-HB | Páll Augustinussen |